

Fleiri av teimum, sum hildu framløgu á ráðstevnuni saman við nøkrum av áhoyrarunum. Mynd Jan Müller/oljan.fo

# Londini í Ríkisfelagsskapinum mugu samstarva í Arktis

**Jan Müller**

21.04.2015 - 19:02

Oljan.fo

Jan Müller av Christiansborg.

Mánadagin setti Sjúrður Skaale, fólkatinsmaður og formaður í Arktiska Arbeiðsbólkinum í Fólkatinginum ráðstevnu um framtíðar vinnumøguleikar í Arktis og í hesum sambandi, hvussu til ber at menna samstarvið millum londini í Ríkisfelagsskapinum, Danmark, Føroyar og Grønland.

"Tað er sera stórt fokus á Arktis í hesum árum. Tíðarrit skriva um Arktis, og ráðstevnur verður hildnar um Arktis, tí er sera stórur áhugi fyri Arktiska Ráðnum og øllum stovnum undir ráðnum. Men í Grønlandi, sum ger danska ríkið til ein part av "The Arctic Five" saman við Russlandi, Norra, Kanadag og USA, eru stórar búskaparligar avbjóðingar.

Í Føroyum, sum eisini liggja innan fyri tann sonevnda arktiska kringin, Polarkringin, er stórur búskaparligur vøkstur í hesi tíð – men her eru kortini stórar demografiskar avbjóðingar. Ov fá arbeiðspláss verða skapt, og alt ov mong flyta av landinum," segði Sjúrður Skaale og helt fram:

"Hvussu kunnu vit brúka tað stóra fokus, sum á Norðuratlantshavið, til at fáa mest møguligar inntøkur til Føroyar og Grønland og skapa flest møgulig arbeiðspláss í hesum báðum londunum?

Hvussu kunnu danskar fyritøkur og fyritøkur í øðrum londum fáa fyrimunir av at gera íløgur í Norðuratlantshavi?

Hvussu kann sama øki í Grønlandi, Danmark og Føroyum samarbeiða? Og hvussu kann man samstarva uppá tvørs av ymsum vinnugreinum? Hvussu kunnu myndugleikar og vinnulív samarbeiða?

Hetta er tað vit vilja varpa ljós á í tí Arktiska Arbeiðsbólkinum í Fólkatinginum," segði formaðurin í Arktiska Arbeiðsbóilkinum.

Hann vísti síðani á, at tað eru nógv bæði spennandi og heilt serstøk stig í Norðuratlantshavi, sum vit kundu valt at seta fokus á í dag – innan so ymsar greinar sum t.d. orku, fiskivinnu, fjarsamskifti og legugransking. Men tað verður eina aðru ferð. Í dag hava vit valt at hyggja nærri at ferðavinnu, sjóvinnu, shipping og flutningi helt hann fyri.

"Vit eru sera fegin um stóra áhugan, sum hevur verið fyri hesum tiltakinum – ikki minst at so mangir og so viðkomandi myndugleikar og fyritøkur eru millum áhoyrarnar.

Vónin er, at tit fara at síggja møguleikar, fáa hugskot og fáa íblástur til at samstarva."

Arktiski Arbeiðsbólkurin er valdur av Fólkatinginum og hoyrir sum so undir donsku umsitingina í Norðurlanda Ráðnum. Bólkurin hevur bert eitt ár á baki, og til nýliga hevði Grønland formanssessin. Nú hevur Sjúrður Skaale, fólkatingsmaður fyri Javnaðarflokkin, tikið yvir.

